B71-NSÍ 0-2 (0-0):

# NSÍ kærkomnan sigur á Sandi



*Ian Højgaard er her fangaður millum tríggjar mótstøðumenn, men tá samanum kom, vóru runavíkingar kortini oman á*
*Mynd: Emil Simonsen*

**B71 varð órógvað av, at teir í fyrsta korterinum noyddust at skifta tveir spælarar út**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*

NSÍ menninir vóru tystir, tá teir komu suður á Sand. Eftir tvey tap á heimavølli ráddi um at venda gongdini, soleiðis at teir ikki heilt skuldu detta niður ímillum botnliðini. Teir fóru norður aftur við øllum trimum stigunum, og so løgdu teir ikki so nógv í, at avrikið ikki var serliga væl polerað við góðum og samanhangandi spæli.

Men kortini eitur tað at geva tilfar til umhugsunar, at tað tykist vera so torført at fáa nógvar góðar fótbóltsspælarar at rigga sum ein væl spælandi eind. Tað var ikki serliga sannførandi ímóti GÍ, men tá bar til at siga, at mótstøðan var so stór, sum tað er møguleiki fyri, at hon kann vera heima á klettunum.

B71 telist ímillum botnliðini, og tí átti tað at verið møguleiki hjá NSÍ at fingið meiri breidd og hugflog í spælið, men tað eydnaðist ikki.

Stóran oart av tíðini var talan um eitt stórt stríð um miðvøllin. Nógvir spælarar vóru savnaðir á einum ikki serliga stórum øki, og so sigur tað seg sjálvt, at talan var um nógvar nærdystir, og at persónligu mistøkini heldur ikki vóru so fá.

## Óhepnir heimamenn

Kári Reynheim hevði hesa ferð sett seg sjálvan á beinkin. Næstseinasta vikuskifti var hann tann einasti B71 maðurin, sum skoraði mál. Hesa ferð megnaði eingin B71 maður at skora, og so er spurningurin, um venjarin fer at hugsa um at seta seg sjálvan aftur á liðið.

Tað er synd at siga, at teir í B71 vóru hepnir. Tá eitt korter var farið, høvdu teir longu tvær ferðir skift fólk. Tað sigur seg sjálvt, at sovorið órógvar.

Bara fýra minuttir vóru farnir, tá miðframherjin, Kári Nielsen, noyddist av vøllinum við fótskaða, sum var so mikið álvarsamur, at ungi maðurin noyddist norður til Havnar at kannast. Og bara eitt lítið korter var farið, tá ytsti miðvallarin í høgru í 3–4–3 spælskipanini, Svenning W. Hansen, noyddist av vøllinum. Hann hevur drigist við vøddaskaða. Hann helt seg vera føran at spæla, men lærvøddin vildi ikki sum spælarin vildi.

## Málini

Uppløgdu málmøguleikarnir kundu teljast á aðrari hondini. Valdemar Nowisci og Jens Martin Knudsen teljast ímillum bestu og royndastu málverjarnar í landinum, men hvørgin teirra hevði sunnudagin serligar møguleikar at vísa, hvør dugur er í teimum.

NSÍ hevði ongan málmøguleika havt, tá teir fingu hol á, og talan var heldur ikki um beinleiðis uppspæl, tá teir í 33. minutti komu á odda. Teir tiltuskaðu sær eitt horna í vinstru. Ian Højgaard lyfti sera neyvt til nærra stólpa, har Eddie Mikkelsen var hægstur og stútaði í kassan, áðrenn málverjin slapp framat.

Sandoyingar fingu í 2. hálvleiki bóltin í NSÍ málið. Eftir fínt uppspæl átti Julian Floresco síðsta fótin á. Dómarin kolldømdi fyri rangstøðu, men tað vóru teir í B71 ikki serliga fegnir um. Teir illneitaðust eisini í einari aðrari støðu, sum teir mettu at vera rættuliga avgerandi, inn á dómaran. Eftir óneyva tvørsending í verjuni hildu sandoyingar seg síggja, at ein av verjuspælarunum sum neyðloysn steðgaði bóltinum við hondini, áðrenn guli álopsmaðurin gjørdist púra leysur, men tað segði dómarin seg ikki hava sæð.

B71 royndi at leggja trýst á, men tað var ikki serliga sannførandi. Í staðin small NSÍ øksin, tá sandoyingar vóru óneyvir í uppspælinum. Altíð raski Sonni L. Petersen sendi Christian Høgna Jacobsen avstað, og landsliðsmaðurin trillaði upp á tvørs til púra leysa Ken Nónklett, ið hevði lætt við at skora og harvið staðfesta sigurin. Ímóti HB á heimavølli var hann eisini avgerandi málskjútti, og nú kann tað fara at verða so skjótt, at tað verða tey, sum fara at sammeta hann við meiri kendar 12. menn sum t. d. David Fairclough hjá Liverpool í sjeyti árunum!

**B71-NSÍ 0-2 (0-1)**
0-1: Eddie Mikkelsen 33
0-2: Ken Nónklett 80

Dómari:
Suni Johansen (SÍF)

**B71:** Valdemar Nowisci – Bergleif Sólsker, Bernhard Petersen, Jógvan Jón Petersen – Svenning W. Hansen, Bjørn Thorsteinsson, Jón Brekku, Hans Jørgen Djurhuus – Eli Hentze, Kári Nielsen, Julian Floresco
**NSÍ:** Jens Martin Knudsen – Gert Langgaard, Arnfinn Langgaard, Dánial Hansen, Sjúrður Jacobsen – Sonni L. Petersen, Ian Højgaard, Brynjolvur Nielsen, Eddie Mikkelsen – Christian Høgni Jacobsen, Martin Glancy






VB-EB/Streymur 1-0 (0-0)

# Meistararnir í trongum skóm

**Tað stóð nógv á hjá føroyameistarunum, tá uppflytararnir vitjaðu sunnudagin, men við einum hepnum máli fram móti dystarenda vórðu tey trý stigini kortini verandi í Suðuroynni**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað var einki at ivast í, hvør var favorittur, tá EB/Streymur sunnudagin kom á vitjan í Vági. Sum uppflytari er tilveran aloftast hørð, og tá talan so eisini er um útidyst móti føroyameistarunum, er einki at siga til, um vónirnar ikki eru av teimum allarbestu.

## Hildu um verjupartin

Hetta tóktist tó ikki á nakran hátt at nerva teir á samansetta liðnum, tá farið var á vøllin. Gaman í vóru teir als ikki komnir suður fyri at hava nakran skapandi leiklut. Heldur løgdu teir dent á verjupartin í vónini um at halda javnleikin, og kanska enn tá loypa hvøkk á mótstøðumenninar við onkrum skjótálopi.

Í fyrra hálvleiki eydnast hetta eisini. Vágbingar høvdu bóltin at kalla alla tíðina, men tjúkt var fyri, og teir høvdu tí ilt við at spæla seg fram til nakrar veruliga møguleikar. Einar tvær ferðir áttu teir kanska at skorað, men úr fríari støðu stútaði Birgir Jørgensen á málverjan, meðan Jón Pauli Olsen rakti stongina, tá hann brádliga stóð leysur á sjálvum málteiginum.

Hinvegin skapti EB/-Streymur ikki tað heilt stóra. Onkur mótálop vóru, og onkur hornaspørk spurdust eisini burturúr, men rættiliga vandamikið gjørdist tað ongantíð. Besta royndin mundi vera eitt langskot, men hesum fekk Bjarni Johansen kortini vart fyri.

## Sama skilið

Í seinna hálvleiki var at kalla sama skilið. Vágbingar trýstu og trýstu, men mál fingu teir framvegis ikki. Aftur vóru teir nær við einar tvær ferðir, men fyrru ferðina bjargaðu gestirnir á málstrikuni, og tá so Predrag Zivkovic ta einu ferðina slapp sær framvið allari mótstøðuni, eydnaðist kortini Gunnari á Steig at verja fyri, tá jugoslavin bert hevði málverjan eftir.

Líkt var tí kanska til, at talan hóast alt skuldi gerast um málleysan javnleik. Minuttirnir gingu, og so líðandi vaks frustratiónin hjá bæði leikarum og áskoðarunum hjá heimaliðnum.

Heilt fram til 83. minutt vórðu hesi hildin á pínubeinkinum, og tá VB so loksins skoraði, var talan um eitt mál av heldur hepnara slagnum. Beint uttan fyri brotsteigin royndi Marek Vierzbicki seg við einum skoti. Vandin var kanska ikki so øgiliga stórur, men á vegnum bar bólturin við beinið á Andrzej Pacek, so Gunnar á Steig bert kundi hyggja at, meðan bólturin sigldi í meskarnar.



*Stóran part av tíðini vóru tað vágbingar, sum trýstu, men tað var ikki fyrr enn fram móti dystarenda, at tað eydnaðist teimum at skora*
*Mynd: Áki Bertholdsen*

## Á rættari leið

Sigurin hevði fyri VB við sær, at teir nú aftur eru at finna á einum heiðursmerkjaplássi. Fyri fáum vikum síðani var hetta ikki nakað, sum tosað varð serliga hart um í Vági. Meistararnir høvdu tá tapt tríggjar ferðir á rað, men nú er vend av álvara komin í. Hvussu langt teir kunnu røkka í ár, fæst helst ein ábending um, tá teir komandi vikuskiftið fara til Havnar. Har er mótstøðuliðið B36, sum tykjast at vera sera væl fyri í løtuni, og spurningurin tykist vera, hvørt vágbingar eru førir fyri at steðga teimum.

Hóast teir í EB/Streymi munnu iðra seg um tapið fyri vágbingum, so er einki at taka seg aftur í, at uppflytararnir higar til hava víst dygdir, sum kunnu viðvirka til at tryggja teimum eitt nýtt kappingarár í bestu deildini. Talan hevur als ikki verið um tey stórtapini, sum fólk kanska bóru ótta fyri undan kappingini, og sjokk-sigurin á norðoyastevnu vitnaði eisini um, at øll mótstøðulið eiga at ansa sær fyri nýggja liðnum.

Tað man eisini vera ein góð sálarlig barlast, at leikararnir nú líka sum vita, at teir væl kunnu standa seg í deildini. Hetta gevur mót og áræði undan dystunum, soleiðis at líka mikið, hvussu stór og møtumikil uppgávan annars tykist at vera, so eru allir til reiðar at lata eitt 100% avrik hvørja ferð. Verður tað eisini galdandi framyvir, er lítið og einki at ivast í, at EB/Streymur eisini komandi ár verður at síggja í bestu mansdeildini.

**VB-EB/Streymur 1-0 (0-0)**
1-0: Marek Vierzbicki 83
Dómari: Petur Hansen (LÍF)

**VB:** Bjarni Johansen – Predrag Zivkovic, Eyðun Jacobsen, Magni Jacobsen – Palli Augustinussen, Marek Vierzbicki, Michael í Lágabø, Krzyztof Popczynski, Jón Pauli Olsen – Robert Ciezlewicz, Birgir Jørgensen

**EB/Streymur:** Gunnar á Steig – Christian Carlsson, Ólavur Poulsen, Alfred Jacobsen – Halldórur Joensen, Knút Vesturtún, Andrzej Pacek, Andreas J. Dahl, Eyðfinnur Joensen – Jón Sigurð Gleðisheygg, Sorin Anghel.

## Máltindurin

| | | |
|---|---|---|
| Helgi L. Petersen | GÍ | 12 |
| John Petersen | B36 | 10 |
| Heðin á Lakjuni | B36 | 6 |
| Sámal Joensen | GÍ | 6 (4 br.) |
| Krzystof Popczynski | VB | 6 (1 br.) |
| Súni Fríði Johannesen | B68 | 5 |
| Jákup á Borg | B36 | 4 (3 br.) |
| Kenneth Jacobsen | B36 | 4 |
| Magni á Lakjuni | B36 | 4 |
| Anghel Sorin | EB/Streymur | 4 (2 br.) |
| Aleksander Djordjevic | KÍ | 4 (1 br.) |
| Birgir Jørgensen | VB | 4 |
| Marek Vierzbicki | VB | 4 |

## Støðan, 1. deild menn

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 GÍ | 7 | 7 | - | 0 | - | 0 | 24 | 8 | 16 | 21 |
| 2 B36 | 8 | 6 | - | 1 | - | 1 | 31 | 5 | 26 | 19 |
| 3 VB | 8 | 5 | - | 0 | - | 3 | 22 | 8 | 14 | 15 |
| 4 HB | 8 | 4 | - | 1 | - | 3 | 15 | 9 | 6 | 13 |
| 5 KÍ | 8 | 4 | - | 0 | - | 4 | 9 | 16 | -7 | 12 |
| 6 NSÍ | 8 | 3 | - | 2 | - | 3 | 9 | 12 | -3 | 11 |
| 7 B68 | 7 | 3 | - | 1 | - | 3 | 15 | 14 | 1 | 10 |
| 8 EB/Streymur | 8 | 2 | - | 0 | - | 6 | 8 | 15 | -7 | 6 |
| 9 B71 | 8 | 1 | - | 1 | - | 6 | 6 | 16 | -10 | 4 |
| 10FS Vágar | 8 | 1 | - | 0 | - | 7 | 6 | 42 | -36 | 3 |